# Ólavsøkuframsýning í SMS

Í morgin byrjar listaframsýning við Bjørg Mohr Anderssen og Edith Mørkøre á torginum í SMS. Hettar er fyrstu ferð Bjørg og Edith sýna fram saman, sjálvt um tað ofta hevur verði ætla at fáa hetta í lag. Tær hava báðar verið aktivar innan fyri at málað og hava verið við á nógvum framsýningum kring landi seinastu árini. Á framsýningini í SMS verður abstrakt og ekspressionistisk list at síggja. Edith og Bjørg eru sera ymiskar í teirra málistíli og gerð hettar at framsýningin er fjølbroytt og spennand. Til framsýningina í SMS hevur Edith arbeitt við strukturi og formum í akryl. Evni sum viðurskifti, ið rørast í tí dagliga lívinum og hendingar sum hon ella fólk rundan um hana koma út fyri hava givið íblástur til málningarnar hesa ferð. Hjá Bjørg verður talan fyri tað nógva um eyðkendu reyðu litirnar, har listakvinnan eisini arbeiðir nógv við kontrastrum og dýpd.



# Ævintýrið um at gerast klók

**Á ólavsøku fara Dánjal á Neystabø og Búi Dam aftur á Ævintýrferð, og hesa ferð er søgan um at gerast vaksin og klókari**

BARNATILTAK
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Ævintýrferðin er væl umtókt millum børn*

Aftur hesa ólavsøkuna er Ævintýrferðin hjá Búa Dam og Dánjali á Neystabø á skránni.

Barnatiltakið verður í ár í nýggja Kommunuskúlanum við Kongagøtu.

Hetta er fimta árið á rað, at Ævintýrferðin er við á ólavsøku, og Ævintýrferðina plaga børnunum at dáma væl.

Á Ævintýrferðini hoyra børn tónleik og sangir, og Dánjal á Neystabø og Búi Dam syngja og spæla saman við børnunum. Onkur nýggjur sangur er gjørdur til hesa ólavsøkuna.

Haraftrat er altíð ein stuttleikur, ein søga, og hvørt ár er søgan nýggj.

Stuttleikurin í ár eitur "Drongurin, sum stjól ein føðingardag". Henda søgan er um ein drong, sum býr í einum húsum saman við øðrum børnum, og hann grunar yvir, hvussu tað verður at gerast vaksin og klókari.

- Meira vil eg ikki fortelja nú, sigur Búi Dam.

Øll Ævintýrferðin tekur ein tíma.

Búi Dam og Dánjal á Neystabø eru einsamallir um at framføra Ævintýrferðina, sum Súsanna Tórgarð hevur hjálpt teimum við at leggja til rættis.

Framførslurnar av Ævintýrferðini verða hvønn dag frá 27. til 30. juli, og tvær framferðslur verða hvønn dag klokkan 16 og klokkan 18.

Dánjal á Neystabø og Búi Dam, sum nú báðir eru 30 ára gamlir, hava verið uttanlands seinsta árið. Búi Dam hevur lisið drama í London, og Dánjal á Neystabø hevur virkað sum tónleikari í Danmark og havt konsertir ymsa staðni í Evropa.

Í november ætla teir báðir sær at ferðast runt Føroyar við einum øðrum nýggjum leiki.

# Loyvt at tosa um hassj

**Futin avvísti beinanvegin málið, tá ið løgtingsmaðurin Bill Justinussen meldaði Rás 2, sum hevði samrøðu við ein hassjroykjara**

RÚSEVNI
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Rás2 breyt onga lóg við at lata ein ónevndan mann siga sína hugsan um hassj, heldur fútin*

Bill Justinussen, løgtingsmaður fekk einki burtur úr tí, tá ið hann í januar mánaði meldaði Rás 2 til løgregluna.

Fútin vísti málið við tí grundgeving, at har var einki hjá løgregluni at fara eftir, sigur Finn Ougaard, varafúti.

Málið snúði seg um, at Rás2 hevði eina beinleiðis sending, har ein ungur maður segði sína hugsan um at roykja hassj. Eitt av hansara sjónarmiðum var, at tað var minni skaðiligt at roykja hass enn at drekka brennivín og roykja sigarettir.

Øði spann í Bill Justinussen, tá ið hann hetta hoyrdi. Hann vant seg í telefonina, ringdi til politiið, sum hann vildi hava at fara beint til Rás2, har tann ungi maðurin sat í beinaleiis sending og tosaði.

Tað vildi politiið ikki, og Bill meldaði so bæði Rás2, teir báðar vertirnar og ónevnda mannin.

Men fútin vistí málið frá sær, tí eingin lógargrein var brotin.


Keypssamtøkan í Hoyvík

FK matstovan í Hoyvík sóknast eftir



## Fólki til køkin

**at byrja sum skjótast**

Starvið umfatar alt vanligt arbeiði í einum matstovukøki.

Arbeiðstíðin verður um 30 tímar um vikuna.

**Løn:**
Sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran, Maud Matras, tel 314149

**FK Hoyvík**
**Att. Maud Matras**
**Brekkutúni 9**
**Postboks 349**
**FO-188 Hoyvík**

fk



## Til leigu

Handilsbygningur á Argjum til leigu. Kann nýtast samlað ella sum fleiri leigumál.

Uml. 500 fermetrar.

Ring og spyr nærri.

**Sp/f Vestur tlf. 23 30 60**

Sosialurin -har tað hendir